LM-105/2020

NUMO

Umhvørvis- og Vinnumálaráðið
Tinganes
FO-100 Tórshavn

11. januar 2021

Sent sum teldupostur á: Annaborgd@uvmr.fo

Hoyringsskriv í sambandi við broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar, grannskoðaravirkir og gildiskomu av ES fyriskipan nr. 537/2014 frá 16. Apríl 2014

Víst verður til teldupost frá Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum frá 7. januar 2021 har biðið verður um, at NUMO tekur støðu til ætlanina at seta reglur um firmarotatión í gildi í Føroyum. Hjálagt teldupostin var hoyringsskriv skriv frá P/F Januar løggilt grannskoðaravirki, sum Umhvørvis- og Vinnumálaráðið (UMVR) metir rættast, at NUMO og SPEKT fáa møguleika til at fyrihalda seg til. Skrivið umrøður reglurnar um firmarotatión fyri fyritøkur av serligum almennum áhuga, her nevnt PIE-fyritøkur, og sjónarmiðini hjá Januar um hetta.

Fyri PIE-fyritøkur er tað einans peningastovnar, har krav er um serligt loyvi frá Fíggjareftirlitinum til at fremja grannskoðan. Hetta loyvi er millum annað treytað av leypandi praktiskari grannskoðan av peningastovnum. Uttan leypandi praktiska grannskoðan fæst loyvið ikki, og fyri teir grannskoðarar, sum hava loyvi, má hetta loyvi latast innaftur, um so er at neyðug praktisk grannskoðan ikki fæst. Er loyvi latið inn, fæst tað neyvan aftur. Tað kann vera álvarsamt fyri grannskoðarafyritøku við fáum ella kanska bert einum persóni við hesum serliga loyvi. Tá er grannskoðarafyritøkan reelt avskorðin frá at grannskoða peningastovnar aftur.

Fyri aðrar PIE-fyritøkur er ikki krav um serligt loyvi frá Fíggjareftirlitinum.

Grannskoðarafyritøkan P/F Januar grannskoðar í dag allar uttan eina PIE-fyritøku í Føroyum. Tað er tí sjálvsagt, at tá talan verður um firmarotatión stendur P/F Januar til at missa mest.

Verða áskoðanirnar hjá P/F Januar tiknar til eftirtektar verður eitt de-facto monopol av grannskoðan av fíggjarfyritøkum í Føroyum, tí fleiri fíggjarfyritøkur eru í samtaki við peningastovnar, har krav er um at hava sama grannskoðara fyri alt samtakið. Hesar fíggjarfyritøkur hava ikki havt útboð av grannskoðan tey seinastu árini. Upplýsast kann, at danskar grannskoðarafyritøkur kunnu ikki sjálvstøðugt bjóða seg fram at grannskoða peningastovnar í Føroyum.

Fyri aðrar PIE-fyritøkur kann avleiðinging av ongari firmarotatión vera, at royndirnar at grannskoða slíkar fyritøkur endar hjá einari føroyskari grannskoðarafyritøku. Avleiðingin av hesum verður so helst eisini eitt de-facto monopol fyri hesar PIE-fyritøkur.

Tað er okkara fatan, at tað samfelagsliga hevur tað týdning, at føroyskar PIE-fyritøkur hava møguleika fyri at vejla ímillum ymiskar grannskoðarafyritøkur at grannskoða ársroknskapirnar. NUMO metir, at kapping á hesum øki er gagnlig fyri føroyska samfelagið.

Vit skulu upplýsa, at vit taka undir við skrivinum frá Felagið Føroyskir Grannskoðarar frá 22. desember 2020.

Vinarliga
NUMO, Góðkent grannskoðanarvirki Sp/f

Súni Schwartz Jacobsen
statsaut. revisor